# 7 stjørnað ólavsøkukabaret

**Meðan ólavsøkukabarettin seinastu árini hevur verið dominerað av mannfólki, halda kvinnurnar seg framat í ár. – Vit vera bæði fúlar, provokerandi og stuttligar, siga tær sjey kabarettdamurnar, sum leggja seinastu hond á Ólavsøkukabarettina 2008 í hesum døgum**

Tær høvdu frætt, at eingin ætlaði sær at skipa fyri ólavsøkukabarettini í ár.

– Í fyrstuni skemtaðu vit við, at vit kundu bara gera kabarettina sjálvar. Men meira vit tosaðu um tað, betri hugskot hildu vit tað vera, og til endans komu vit fram til at gera eina reina kvinnukabarett, siga tær seks kabarettdamurnar: Tjóðhild Patursson, Durita Dahl Andreassen, Marita Svartá, Mariann Hansen, Barbara Hentze í Stórustovu, Lisa í Dali og Rakul Thomsen.

Allar eru samdar um, at tær kenna eitt ávíst trýst. Á ólavsøku rinda fólk pengar fyri at sleppa at flenna. Men tær vistu um hetta trýstið, áðrenn tær átóku sær at hava kabarettina.

– Tíbetur hava vit ongantíð havt hasa kensluna í senn. Um ein av okkum hevur hug at bakka út, so eru hinar skjótar at fáa hana á betri tankar. Og nú eru vit komnar somikið langt, at vit eru sannførdar um, at hetta verður skidegott, siga tær.

### Kenna seg aftur

Hóast eingin teirra hevur verið við í kabarettini áður, so hava tær royndir innan sjónleik. Tær hava allar verið virknir ungdómsleikarar, umframt at nakrar teirra hava sitið í FUR. Eisini eru tær báðar Marita Svartá og Mariann Hansen júst afturkomnar av leiklistaskúla uttanlands.

Spurdar, hvussu man fyrireikar eina kabarett, vísa tær á, at tær høvdu ein stóran brainstorm, har tær tosaðu um alt tað, sum var farið fram síðani seinastu ólavsøku, bæði tað stuttliga og tað álvarsama. Eisini hugdu tær í bløðini, fyri at finna útav, júst hvat tað í grundini var, sum hendi í ávísum málum.

– Fólk skulu kenna søgurnar aftur. Tí taka vit mál upp, sum hava havt ein breiðan áhuga, og sum hava verið nógv frammi. Tað ber ikki til at fara í smálutir, tí so verða tað ov nógv, sum ikki ána, hvat tað snýr seg um. Men vit taka eisini gerandisstøður upp. Støður, sum ikki vísa til nakað ávíst mál og ikki eru tíðaraktuellar, men har fólk kortini kenna seg aftur, siga tær.

### Festligt og fúlt

Tær halda, at man helst fer at leggja merki til, at tað í ár eru sjey konufólk, sum hava gjørt kabarettina.

– Tað er upplagt hjá okkum at koyra eitt sindur uppá, at vit bert eru konufólk. Í tíðindaskrivinum, sum vit sendu út, skrivaðu vit eisini, at vit fara at hyggja at feminismuni og flenna eitt sindur at henni. Men vit fara ikki bert at spæla kvinnuligar leiklutir, siga tær flennandi, og vísa á, at tær helst noyðast at klippa nøkrum parúkkum, so tær eisini kunnu verða menn.

### Býttar viðmerkingar

Ein afturvendandi viðmeking til tær hevur verið, at um tað bara eru konufólk við, so verður kabarettin helst ikki so fúl. Onkur hevur enntá hildið, at so verður kabarettin ikki so stuttlig, og at skemtið ikki kann verða líka intelligent, sum tá mannfólkini høvdu hana. Tær hava eisini upplivað, at fólk hálvavegna vænta, at tær fara at gera sær fyri skommum.

– Ja, vit kundu næstan havt eina eyka kabarett um allar tær tápuligu viðmerkingarnar, sum vit hava fingið, siga tær flennandi. Tær leggja afturat, at sjálvandi kunnu konufólk eisini vera fúl og skemta við tí, sum er undir beltistaðnum. Men tær royna at blanda tilfarið væl, so tað ikki bert verður tað fúla, sum sleppur framat.

Kortini vilja tær ikki ordiliga svara, tá tær verða spurdar, hvat vit kunnu vænta okkum av ársins kabarett.

– Sumt tilfar er upplagt og má við; til dømis hevur løgtingsval verið. Men vit hava eisini nógvar sangir, tí vit hava funnið útav, at vit duga ordiliga væl at yrkja, siga tær, og skoyta uppí, at eingin skal kenna seg heilt tryggan.

### Onnur eygu á

Tær sjey ungu kvinnurnar hava eisini leitað sær hjálp uttanífrá til kabarettina. Tí, sum tær siga:

– Tá man arbeiðir so tætt saman, verður skemtið ofta innforstaðið. Vit sjey halda tað vera ordiliga stuttligt, men hini skilja tað ikki.

Tí hava tær fingið Súsannu Tórgarð at hyggja eftir tilfarinum, og tað er meiri enn so komið fyri, at hon hevur vrakað okkurt, tí hon ikki helt tað vera stuttligt.

– Eftir hennara ráðum, hava vit tí broytt okkurt so hvørt. Tí tað er betri at fáa onnur eygu at hyggja tilfarið ígjøgnum, áðrenn ólavsøkan er komin, vísa tær flennandi á.

Tær halda tað eisini vera eina fyrimun, at tær eru sjey, tí tær stuðla hvørji aðrari so væl. Og dirvið bilar ikki hjá hesum sjey ungu kvinnunum.

– Hetta verður ein góð kabarett. Og vit fara at prógva, at vit ikki standa aftanfyri nøkur mannfólk, tá tað kemur til skemt – óansæð um tað er fúlt ella ikki. Vit ætla eisini at hava ein boðskap – og eru ikki bangnar fyri at provokera!

*Tekstur: Eydna Skaale*



***Leikararnir á ársins kabarett eru standandi f.v.: Marita Svartá, Rakul Thomsen, Lisa í Dali og Barbara Hentze í Stórustovu. Sitandi f.v.: Tjóðhild Patursson, Durita Dahl Andreassen og Mariann Hansen***

***Mynd: Sunva Eysturoy Lassen***

***Tær sjey vænta, at tað helst fer at merkjast, at tað í ár einans verða konufólk við í kabarettini. Men tær ætla ikki at standa aftanfyri mannfólkini***

***Mynd: Álvur Haraldsen***